# av London Fashion Week



*Jóhanna1: Wendy Scott beit serliga merkið til hesa longu gráu troyggjuna, ið Jóhanna av Steinum hevði sniðgivið*



*Elisa1: Stuttu jakkarnir hjá Elisu Heinesen vóru sambært Wendy Scott bestu sniðini á mótasýningini*



*Gudrun1: Guðrun og Guðrun sýndu bæði vetrar og summarpløgg fram*

í hasa gráu longu ullintu troyggjuna hjá Jóhannu av Steinum, hon var fullkomiliga í tíðini, og Jóhanna kundi komið langt, tað dugi eg at spáa.

- Eisini var eg bergtikin av hasum stuttu jakkunum, ið Elisa Heinesen sýndi fram. Mátin sum teir vóru settir saman við stuttum buksum riggaði øgiliga væl. Hasir jakkarnir vóru uttan iva tað besta, ið varð sýnt fram. Hasir jakkarnir kundu uttan trupulleika verið partar av London Fashion Week. Teir vóru fullkomiliga "cutting edge" og serligir. Teir vóru egnir og ordiliga gott snið. Eitt slag av klassiskum punki haldi eg, hetta er øgiliga In Vogue sum man sigur, altso øgiliga moderna beint nú, segði Wendy Scott við stórari sannføring.

- Eg haldi eisini, at sjálv koreografiin og stylingin og avviklingin var sera góð. Alt virkaði umhugsa og liðugt, eg eri errin av at hava verið partur av hesum, segði roynda blaðkvinnan at enda.

# Føroysku tónleikainnsløgini á Funky Faroe Islands vaktu ans

**Fleiri av umboðunum fyri tónleikaídnaðin og bretsku fjølmiðlarnir, ið vitaðu Funky Faroe Islands dámdu væl framførslurnar hjá Eivør og Teiti.**

FUNKY FAROE ISLANDS
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Teitur spældi eitt stutt og kekkað sett*



*Eivør vísti brot úr síni fjølbroyttu yrkisleið*

Heilt fitt av fólki úr tónleikaídnaðinum var komið saman til Funky Faroe Islands. Har vóru umboð fyri bløð sum Mojo, Kerrang, Playlouder, fyri MTV, plátufeløg, bookingfeløg og aðrir talentskótar. Tey upplivdu kongin og drotningina innan føroyskar tónleik Teitur og Eivør framføra nøkur av sínum løgum. Eivør spældi eina fjølbroytta skrá, ið umboðaðu hennara fjølbroyttu yrkisleið higartil. Hon legði fyri við Hjarta mítt, eitt lag, ið vísir ræddarstyrkina og sum er eitt av hennara sterkastu løgum. Hon fór víðari til ein spildur nýggjan sang, ið hon hevði skrivað til Móður Theresu. Lagið hevði nokkso beinleiðis tilvísingar til Louis Louis hjá Teiti, og snúðið seg um, at Móður Theresa skuldi koma aftur og bjarga okkum. Um tilvísingin var tilætlað eri eg ikki greiður yvir. Lagið var á enskum og var eitt sindur í trá við tann kontrikenda stílin, ið Eivør spældi saman við Bill Bourne. Lagið var ikki tað besta, ið Eivør hevur gjørt, men var á onkran hátt nokkso fitt. Hennara fjølbroytni kom aftur til sjóndar tá Trøllabundin var á skránni, áðrenn hon endaði við tí eitt sindur kontrikenda og amerikanskt íblásta Coloured Road, ið ivaleyst er besta lagið hjá Eivør innan hesa sjangru. Fleiri fjølmiðlafólk og onkur talentskóti, vísti Eivør stóran áhuga eftir konsertina.

Teitur átti alt hølið. Frá tí løtuni, hann byrjaði at spæla I Was Just Thinking, vóru áhoyrarnir bodnir inn í Teiturland, har hann segði frá søgum á sín egna sjarmerandi hátt. Løgini Josephine og Guilt By Association leiddu upp til núverandi stakfløguna Louis Louis, ein akkustisk útgáva av lagnum við bert Teiti, ið ikki heilt livdi upp til útgávuna av lagnum, ið vit kenna av fløgu og konsert, har hann spælir saman við bólki sínum. Eitt stutt og sera kekkað sett, ið eisini vakti ans millum tey, ið umboðaðu ídnaðin á tiltakinum.